# Gamlar myndir í Miðvági

**Miðvágs Fornminnafelag fer leygardagin at hava framsýning av gomlum myndum og klæðum**

FRAMSÝNING
*Edvard Joensen*



*Á myndaframsýningin í Miðvági leygardagin ber millum annað til at síggja eina gamla mynd av Julionnu á Støðini, umframt eisini kjólan, hon er avmyndað í fyri meira enn hundrað árum síðan*
*Mynd: Miðvágs Fornminnafelag*

Seinnapartin leygardagin letur ein framsýning upp í bygdarskúlanum í Miðvági. Talan er um gamlar myndir og klæðir, sum Miðvágs Fornminnafelag sýnir fram. Framsýningin er opin frá klokkan 15.00 til klokkan 21.00, og tað kostar 30,- krónur at sleppa inn.

Høvuðsevni á framsýningini eru gamlar myndir, sum Fornminnafelagið hevur fingið hendur á. Eitt nú er ein mynd av hjúnunum Julionnu og Jógvani Heinesen.

Julianna á Støðini, sum hon varð nevnd, varð født í 1864. Hon var í árunum 1882 til 1884 í Danmark og tænti, og fekk tá millum annað ein kjóla, sum hon er avmyndað í á eini mynd, sum er á framsýningini. Men umframt myndina, er eisini hesin sami kjóli, sum myndin sýnir, at síggja á hesi framsýningini, siga tey, sum skipa fyri. Eisini onnur klædnapløgg hennara eru at síggja har. Myndirnar, sum eru at síggja á framsýningini, eru tiknar í nítjandu øld og fram til annan heimsbardaga.

Umframt sjálva framsýningina, verður eisini køkutombola í gongini í skúlanum, har tað samsundis eisini fer at bera til at kypa sær ein køkubita aftur við einum drekkamunni.

# Lions tiltak á Giljanesi

**Lions Club í Vágum skipar aftur í ár fyri tí árliga Giljanes tiltakinum føstulávints sunnudag**

INNSAVNAN
*Edvard Joensen*

Árliga Giljanestiltakið hjá Lions Club í Vágum verður sum vanligt hildið føstulávintssunnudag í ítróttarhøllini á Giljanesi.

Lions Club skipar fyri hesum titlaki til tess at savna pening til ymisk vælgerandi endamál. Í ár fer høvuðsstuðulin til at hjálpa til at gera gamla flogtornið, sum bretar bygdu oman fyri flovøllin, í stand. Tornið stendur uppi enn, men er illa farið. Ætlanin er at gera tað so líkt tí, tað einaferð var, sum gjørligt.



*Høvuðsparturin av ágóðanum av Giljanestiltakinum hjá Lions Club í Vágum í ár, fer til at seta gamla flogtornið, sum bretar bygdu við flogvøllin, í stand.*
*Mynd: Edvard Joensen*

Umframt eru so onnur tiltøk, sum Lions Club stuðlar, og sum partur av innkomna peninginum frá Giljanestiltakinum eisini fer til.

Tiltakið byrjar seinnapartin klokkan 16.00. Har verða ymisk tiltøk at fara til sum eitt nú mattombola, eydnuhjól, 21-spæl, skjóting og ymiskt annað.

Stóra tiltakið er á hvørjum ári eydnuhjólið, har millum annað lutir, sum gjørdir eru til sjálvt tiltakið, eru at vinna.

Ymiskt undirhald plagar at vera á hesum tiltøkunum. Serliga tónleikalig. Í ár fer Ungdómsorkestrið í Vágum at spæla. Tað verður klokkan 18.00 sunnukvøldið.

Ungdómsorkestrið hevur í longri tíð vant til eina stóra konsertferð í summar. Tey ætla sær heilt til Australia at halda konertir.

# Grindavísan í nýggjum hami




*Nýggja útgávan av Grindavísuni inniheldur eisini tilfar um grindadráp og hagreiðing av spiki og tvøsti*

**Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið Grindavísuna út aftur av nýggjum**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Hettar er ein nýggj og broytt útgáva, har serliga parturin um grindadráp er dagførdur, so hann samsvarar við mongu broyttu krøvini á økinum.

Í bókini er Grindavísan, ið Christian Pløyen yrkti, sett upp sum teknirøð við frágreiðandi og livandi tekningum eftir Óla P. til tey 58 ørindini í vísuni.

Síðani er uppískoyti, sum snýr seg um Grindavísuna og grindadansin. Við myndum, tekningum, talvum og teksti verður sagt frá grindadrápi, hagreiðing av tvøsti og spiki, grindareglugerð og umhvørvisfelagsskapum. Myndir og tekningar eru í litum. Kristoffur Kristoffersen og Astrid Andreasen hava myndprýtt tann frágreiðandi partin av bókini. Harumframt eru nógvar fotomyndir, ið greiða frá grindarakstri og -drápi, umframt hagreiðing av tvøsti og spiki.

Aftast í bókini eru arbeiðsuppgávur, ið hóska til framhaldsdeildina. Bókin er ætlað til undirvísing í fólkaskúlanum og í miðnámsskúlum. Umframt til undirvísing í føroyskum, ber væl til at nýta partin um grindadráp til undirvísing í lívfrøði í framhaldsdeild og miðnámsskúlum.

Ása Magnussen og Paulivar Andreasen, lærarar, løgdu fyrstu útgávuna til rættis. Harafturat hava Jústines Olsen, djóralækni, Ólavur Sjúrðarberg, formaður í Grindamannafelagnum og Valborg Rasmussen, lærari, skrivað hvør sín frágreiðandi part um grindadráp og hagreiðing av tvøsti og spiki í nýggju útgávuni.

Føroyaprent hevur prentað bókina.

Grindavísan er 48 síður, kostar 120,00 krónur og fæst til keyps í bókasølunum um alt landið.